# FÓLK
## til Griffilin

**Søkt verður eftir fólki at arbeiða hálva tíð**

Vit sóknast eftir fyrikomandi, ágrýtnum fólki, sum dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

Arbeiðstíðin er aðruhvørja viku fyrrapart, aðruhvørja viku seinnapart og annaðhvørt vikuskifti.

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir innan handil, men hetta er tó eingin treyt.

Tú kanst byrja beinanvegin.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so send okkum eina skrivliga umsókn ella ring og tosa við Róa Kalsø á tel 310840.

griffilin
SMS

## Dúkar

**Dúkar verða útleigaðir til konfirmatiónir · brúdleyp · barnadóp og aðrar veitslur**

**Tygum kunnu avheinta teir á hesum støðum:**
*Seytjan í Havn*
*Jungmann í Runavík*
*Josi á Skála*
*Rokoko í Gøtu*



**Klaksvíkar Dampvaskarí**
**Tel. 455160**


## Vága Javnaðarfelag

### Uppstillingarfundur

2. og 3. uppstillingarfundur til løgtingsvalið verður í Arbeiðsmannafelagshúsunum í Miðvági fríggjakvøldið 1. mars kl. 19.30.

**Nevndin**

Lesið Sosialurin -tað loysir seg

## Verkfrøðingur

**til Teknisku deild hjá Sørvágs Kommunu**

Søkt verður eftir starvsfólkið við tekniskari útbúgving verk/byggifrøðing til teknisku deild hjá Sørvágs kommunu. Talan er um eitt spennandi og sjálvstøðugt starv.

**Høvuðsuppgávur**
- At taka sær av projektering, uppmálingum og eftirlit av øllum viðlíkahaldi og nýíløgum í kommununi.
- At fyrireika mál, ið skulu leggjast fyri teknisku nevnd.
- At skipa fyri avgreiðslu av nevndar- og bygdarráðssamtyktum.
- At samskifta við borgarar, feløg og stovnar.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal vera verkfrøðingur, byggifrøðingur ella hava líknandi útbúgving.

**Persónligir eginleikar**
Umráðandi er, at umsøkjarin dugir væl at leggja arbeiði til rættis, er fyrikomandi, kann arbeiða sjálvstøðugt og er til reiðar at luttaka í øðrum arbeiði hjá kommununi, enn omanfyri nevnt.

**Setanarviðurskifti**
Setanartreytir sambært sáttmála við arkitekta/verkfrøðingafelagið.

**Kommunan bjóðar**
eitt áhugavert starv, ið er fakliga og persónliga mennandi við góðum arbeiðsumstøðum.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til kommunuskrivstovuna í Sørvági á tlf. 332004 ella 210504.

**Umsókn**
Saman við upplýsingum um útbúgving og royndir skulu umsóknir verða Sørvágs kommunu í hendi í seinasta lagi 25. mars 2002.

**Sørvágs Kommuna**
FO-380 Sørvágur
tlf. 332004 – 210504

## Norðoya Javnaðarfelag

### Uppstillingarfundur

2. og møguliga 3. uppstillingarfundur verður í Bøgøtu 3, mánakvøldið 4.3. kl. 19.30.

**Nevndin**

## Frá Vestsalmon

**Kollafjørður**

Søkt verður eftir fólki at byrja beinanvegin. Arbeitt verður í trimum vaktum. Ring tlf. 421691 ella 220030.

VESTSALMON

Gøtu Kommuna

## Gøtu Kommuna søkir

**1 dagrøktara**, at byrja skjótast tilber.

**1 sjúkraavloysara** fyri dagrøktararnar, at byrja skjótast tilber.

Dagrøktarheimið skal vera innrættað barnavinarligt, har rúm er til børnini at spæla í og hóskandi trygt spæliøkið uttanfyri.

Lønin er sambært sáttmála við Føroya Kommunala arbeiðsgevarafelag.

## Til Dagstovnin søkist

**1 hjálparfólk** til arbeiði í stovu við 18 børnum í aldrinum 6–7 ár, starvið er tíðaravmarka frá 15. mars til 15. juli 2002.

Arbeiðstíðin er 25 tímar um vikuna skiftandi tíðir.

**1 sjúkraavloysara** at byrja skjótast gjørligt.

Lønin er sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Torgerð Hansen, tlf. 442012 lokal 10.

Skrivlig umsókn við avritum av viðmælum og øðrum skal sendast okkum áðrenn 11. mars 2002.

**Dagstovnurin í Gøtu**
Box 32
511 Gøtugjógv

## Aðalfundur

Føroya Náttúru- og Umhvørvisverndarfelag – FNU – hevur aðalfund á Hotel Hafnia:

***leygardagin 16. mars kl. 14$^{00}$***

Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**

## Fólk søkist

Søkt verður eftir fólki at arbeiða í sølubúðini og at matgera til 6 mans umborð á strandferðaskipinum Teistanum – (Sandoyarleiðin).

Arbeitt verður í skiftisvaktum eina viku umborð og eina viku frí. Góð løn verður givin. Tú skal bert kunna matgera vanligan føroyskan mat.

**Áhuga kunnu ringja 211099 ella 361299**



# HEILSANIR




**Góði beiggi**
Hjartaliga tillukku við degnum tann 1. mars. Nú mást tú skunda tær eitt sindur, tú blívur jú 29.
**Heilsan, Eyðun og Magdalena**



**Góði babba**
Hjartaliga tillukku við 30 ára degnum. Eg gleði meg til túrin niður til Eyðstein gubba.
**Heilsan, Jákup**



Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum, Aimée 8 ár 28. febr., Eyðbjørg 6 ár 5. jan., Otto og Elmar 2 ár 26. des. Alt tað besta í framtíðini ynskja
**mamma og babba**



**Góðasta, fitta Kolbrún**
Ordiliga stórt tillukku við 10 ára føðingardegnum. Minnist tú drekkamunnan og pannukøkurnar í havanum hjá ommu, tú og Ragnhild. Eisini knús og klemm til hana. Dudd-omman í Sandavági fær eisini eina heilsan við 1.3.
**Heilsan, Erl-omma**



**Góða Heidi**
Hjartaliga tillukku við 6 ára degnum 29. febr. Her hugnaði tú tær.
**Heilsan, omma og abbi**



**Góða, elskaða Irdi**
Hjartaliga tillukku við 25 ára degnum 28. febr. Gleða okkum til ballið leygarkvøldið. Takk fyri alt tú ert fyri okkum.
**Heilsan, vit uppi á**



**Góði Jóhan!**
Hjartaliga tillukku við 29 ára degnum 1. mars. Jesus pápi fylgi tær. Nær fert tú at koma við eini damu?
**Heilsan, mamma og babba**



Hvør skuldi trúð, at hesin skoytusnillingur á Italiuferð er vorðin 30 ár? Hjartaliga tillukku!
**Áskoðarin**



**Góða, elskaða Vár**
Hjartaliga tillukku á 5 ára degnum í dag 1. mars. Jesus signi teg og framtíð tína.
**Babba**



**Góða Vár**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við føðingardegnum í dag. Jesus pápi velsigni teg.
**Omma, abbi og fastir**



**Góði Regin**
Hjartaliga tillukku við teimum 25 árunum, HB luktar best!
**Bestu heilsanir, starvsfelagarnir**

## Heilsanir

**30,- kr.** Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .......................................................................
Bústaður: .......................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »Heilsanir«